## Stórtap í Estlandi

Tað hevur ikki hilnast nakað serligt í tveimum teimum fyrstu uppgerðunum hjá U-17 gentunum, sum eru í Estlandi og luttaka í EM undankapping. Hósdagin tapti liðið 9-0 ímóti Finlandi. Hálvleiksstøðan var 4-0. Mánadagin tapti føroyska liðið 5-1 ímóti Belgia. Sunnudagin skulu U-17 genturnar spæla síðsta dystin. Hann verður ímóti Estlandi. Mánadagin vann Finland 12-1 ímóti Estlandi.



lið



# Síðsti møguleiki á Argjum



**Síðani innanhýsis uppgerðina í Klaksvík hevur tað gingið sum eftir ánni hjá KÍ, meðan AB úrtøkan hevur verið so mikið lítil, at AB sunnudagin skal vinna, um nøkur vón um bjarging skal vera**

**AB-KÍ**
*Jóannes Hansen*

Í 15. umfari 4. juli var AB í Klaksvík. Tá stóð nógv upp á spæl hjá klaksvíkingum, sum – um teir einki fingu burturúr – høvdu verið yvirhálaðir av AB og harvið høvdu verið á niðurflytingarplássi.

Síðani er nógv vatn runnið í fótbóltsánna. Burtur úr sjey umførum hevur KÍ fingið 16 stig, og tað hevur borið 5. pláss á støðutalvuni við sær. AB hevur fingið fýra stig burturúr, og vánirnar síggja einki serligar út.

- Vit hava ikki mist mótið, men um møguleikin at sleppa undan niðurflyting framvegis skal vera til staðar, so er neyðugt at vinna ímóti KÍ, er boðskapurin av Argjum.

Tá ið neyðin var størst í Klaksvík fingu teir Denni Conteh úr Danmark at hjálpa til við álopsspælinum. Síðani hevur gingið væl hjá KÍ, men Denni Conteh hevur ikki verið førur fyri at hjálpa so nógv til. Nú er hann komin fyri seg aftur, og hann fer at fáa bonkarkjans á Argjum.

Hvørki AB ella KÍ hava átt part í landsliðsferðalagnum í Litava. Báðir partar hava átt part í U-21 liðnum. Kristoffur Jacobsen hjá KÍ vandi hóskvøldið fyri fyrstu ferð í hesi vikuni, og tað sama gjørdu Rógvi Holm, Jónas Þór Næs og Pætur Jørgensen.

## Við – ikki við

**Ivasamur: Rasmus Nolsøe (skaða í fótliðnum)**

**Allir tøkir**

**Ikki við: Okebe Obele Onyebuchi (leikbannaður)**

**Ikki við: Kaj Ennigarð (leikbannaður)**
**Við aftur: Harley Bertholdsen og Denni Conteh (báðir eftir at hava verið skaddir)**

**Ikki við: Martin Tausen (leikbannaður)**